FØROYA LANDSBÓKASAVN

Føroya Sosial-Demokratur

FRÆLSI JAVNAÐUR BROÐURSKAPUR

Nr. 10 | Lýsingarprísur fyri mm: 20 oyru á 1. síðu, 15 oyru á 3. og 4. síðu | Leygardagin 24. februar 1951 | Blaðið verður bílagt á posthúsinum, og kostar kr. 2,50 + porto um fjórðingsárið | 25. árg.

HVØR HEVUR ÁBYRGDINA

Dimmalætting og Dagblaðið eru nú farin at gremja seg um at tingsetan ikki verður enda. Tingsetan, sum byrjaði á Ólafsøku varðar enn, og einki útlit er fyri at hon endar í bræði.

Sum øllum kunnugt er tað fólkaflokkurin og sambandið, sum stýra og ráða bæði í landsstýri og á tingi. Fólkaflokkurin, sum síðani 1940 hevur haft til jótur, at tað eru hinir sum hava skyldina kunnu vit fyri so vítt umbera, tí sum orðataki sigur: »ringt er barndømið at kasta«, men tá nú »Dimma«, sum trúgvur fylgisveinur Dagblaðsins leggur uppí við at leggja skuldina á javnaðarflokkin, tí at ein tingmaður, sum var limur av fiskivinnunevndini, bað um, tá álit í trolaramálinum skuldi leggjast fram, at fáa loyvi til at lesa tað reinskrívaða álitið ígjøgnum, áðrenn hann undirskrivaði tað, men fekk kortanei til aftursvar, tí at nú skuldi handlast skjótt, so skilja øll, at hetta hevur einki við skjóta viðgerð at gera. Landsstýrið hevði bølt málinum í $2^1/_2$ mánað, meðan javnaðarmenn ikki kundu fáa hálvan tíma, sum biðið var um, til at lesa málið ígjøgnum.

Síðsta ár, tá lógin um at tvinga trolarar til at selja veiðu sína í Onglandi, var til viðgerar og ein javnaðarmaður hevði skrivað undir eitt álit í treysti til, at álitið var skrivað sum av nevndini samtykt, men seinri var varur við, at feilur var komin í og bað um at fáa hetta rætta, leyp Dimmalætting harðliga á, at menn soleiðis settu navn sítt undir nakað, teir ikki høvdu lisið. Nú ger sama blað seg til talsmann fyri líka tí mótsatta, við at loypa á em tingmann, tí hann fannst at, at ein nevndarformaður (Bláhamar) vísti slíkan ónærisligan atburð, at nokta nevndarmanni at sleppa at lesa tað, hann sjálvur var partur í og skuldi skriva undir. Hevði Danbjørg skriva undir, so hevði hann bundið seg til nakað sum hann var ímóti.

Tað sum Jens Chr. Olsen sum formaður í fiskivinnunevndini gjørdi í fjør var eitt politiskt bóndafangarakneb, og tað, sum samgongan nú ætlaði at gera, var tað sama, men Danbjørg gekk ikki í felluna. Hann fekk lisið og rættað tað snm skeivt var. Hetta er Dimma ørg yvir, og roynir nú at billa fólki inn, at tann hálvi tímin Danbjørg bað um til at lesa álitið ígjøgnum, skuldi viðføra, at tingsetan bleiv longri enn neyðugt — alt ov ússaligt. Nei, tit hava givið tykkum fólkaflokkin í vold, sambandsmenn, og megu sjálvandi bera ábyrgdina saman við honum.

Skúlablaðið

Í. hefti av Skúlablaðnum 1951 er komið. Innihald: Málspilla eftir Marius Johannesen, lærara í Mikladali. — Minningarorð um Karl Kristiansen, fyrrv. lærara í Fuglafirði, og Andreas Joensen, fyrrv. lærara í Lorvík, eftir S. P. úr Konoy. — Eitt sindur um bókasøvn, eftir J. M. Kjeld, lærara Tórshavn. — Samafólkið í Noreg, eftir J. K. — Skúlin á Tröllanesi, eftir Marius Johannesen og ymisk smákut.

Næsta nr. av Skúlablaðnum kemur ein av fyrstu døgunum.

TELEGRAMMMAÐURIN

Av og á hevur ein hoyrt um telegrammmannin.

Táverandi vørunevnd og løgtingsmenn vóru sjálvandi greið yvir, hvønn sipað var til, og hvat ið búði undir hesum heiti.

Hin føroyski almenningurin visti harímóti púrt einki.

Merkiligt so hóliga var farið fram, tá ið ein nú í seinastuna Sosiali sær svart uppá hvítt, hvørja óhoyrda gerð nevndi Jákup Jensen, nú Jákup á Dul, hevði í hyggja at útinna móti Føroya fólki — enntá í størstu vandatíðum. Lukkutíð fyri mannin, at hann ikki var borgari í kríggsførandi landi.

Ógerð Jákups á Duls varð vavd inn í eina spakføra gerðabókaviðtøku. Ólukkan var avvard í teirri syftu, og Føroya fólk varð spart fyri at gjalda ein meirpris uppá 60—80 kr. pr. tons fyri neyðsynjarvøru í verstu kríggstíð.

Men telegrammmaðurin streyk líka stinnur út av vørunevndarfundinum við nýstroknari samvitsku — og hendingin var gloymd.

Ein vil illa trúgva greinini um Jákup á Dul í seinasta Sosiali — og ein spyr: Hvør í Guðs gardi hevur sent henda mann til Týskalands?

Sosialurin sigur uppaftur eftir Dimmalætting, at hann er farin saman við ongum minni enn teimum báðum hægstu skrivstovustjórunum hjá tinginum, Jóhann Djurhuus, løgmanssoninum, og dananum Nicolaisen — í Tórsteins ørindum!

Og ørindini hjá hesum trimum monnunum vóru at røkja handilsavtalur.

Privatar ella almennar?

Um tað eru talan um almenn ørindi, kann so okkara landsstýri ganga ímóti eini tingsamtykt, sum forbýður tí almenna at hava nakra forrætning við henda viðgitna telegrammmannin at gera?

Eitt stívt stykki at bjóða Føroya fólki!

Tingsamtyktin móti Jákup á Dul er ikki strokin. Hon er heldur ikki avloyst við aðrari, sum heimilar landsstýrið at hava nakað at gera við henda mann sum álitismann landsins.

Hvørki landsstýrið, vørunevnd, valutanevnd ella annar almennur stovnur hava loyvi at hava nakað forrætningsligt við hann at gera.

Mestur verður svarað, at maðurin er farin í egnum ørindum — skavað út yvir. Men um tað er so, er tað bara so mikið verri. Skal virkuliga hesin yvirgangsmaður av landsstýrinum fáa tað »privilegium«, tann framihjárætt frammum allar aðrar, at luða uppi í almennari útsending fyri at koma framat at gera síni »buisiness« uppá Føroya fólks kostnað?

Men hvarum alt snýr seg, so fekk almenningurin hitt mentala »røntgenbílætið« av einum flokks »ØVERSTE«.

Matadorur í handilsskapi!

Superagitator í fólkaflokkspolitikki — nú fólkaflokks-sambandspolitikki.

Sjálvsettur í hásæti sum revsari av neyðar syndarum — væl at merkja í dagslýsi; tí í tí myrka er sjálvt hin svartasti syndari oftani hentur »brikkur«.

Sögan um farisearanar og tollararnar er livandi enn.

—

Spell bert at vinnuligt, politiskt og andaligt lív skal verða so tilgruggað.

Lesandi.

SETEPLAKEYPIÐ

Hervið letur Landshandilin vita, at seteplini koma at kosta 27 kr. posin og at tey eru vantandi til Føroyar um 15. mars,

Síðani seinast ið skrivað var um eplaveltingina eru líkindini fyri frið í útheiminum ikki vorðin eitt vet ljósari, tvørtur ímóti ræðast menn fyri hvat, ið fer at henda nú ið várið kemur. Tað eru tí allar áneyður til, at øll sum sita við jørð gera álvara av at velta so mikið at oyggjarnar kunnu verða sjálvbjargnar við eplum.

Latum okkum minnast til, at tann sum hevur líkindi til at velja jørð til eplir, hann velir

a) Jørð sum er turr,
b) Jørð sum moldin ikki skelloypur
c) Jørð sum liggur undanbar, fyri ættum ið eru vanar at gera skaða.

Viðvíkjandi töðuni minnast vit til,

a) At tari eigur ikki at verða nýttur til eplir.
b) at tann árvísasta gröðin kemur av annahvørt fullari fjóstøðu við einum sindri av salpetur aftur at ella hálvari fjóstøðu og hálvari handilstøðu.
c) at full handilstöða í miðal jørð er
26 kg salpetur
18 kg superfosfat
15 kg kalitöð á tunnulendið.
b) at tað er beinast at sáða superfosfat og kalitøðini nú, men goyma salpeturstöðini og geva helvtina av teimum tá ið niður verður sett og hina helvtina tá ið eplini eru uppkomin.

Fólk ið ynskir at keypa av hesum seteplainnflutningi eigur at venda sær til búnaðarráðgevara áðrenn 5. mars.

H. J. Jacobsen.

